

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 09 - 2012

# Thorning í Grønlandi - Ráevnisavtalan verður ikki broytt

Á ríkisfundinum í gjár vissaði Helle Thorning-Schmidt, forsætisráðharri, grønlendska landsstýrisformannin, Kuupik Kleist, um, at Danmark fer ikki at krevja nakra brotying í avtaluni um, hvussu inntøkurnar av møguligum ríkidømi í grønlendsku undirgrundini skulu býtast. Forsætisráðharrin sigur við Ritzau-tíðindastovuna, at eydnast tað at fáa gongd á ráevnisævintýrið í Grønlandi, kann tað bera í sær, at Danmark sleppur frá at senda 3,5 milliardir krónur í blokkstuðuli til Grønlands um árið. "Vit hava eina góða avtalu, og tað ber til at siga, at Danmark og Grønland skulu býta inntøkurnar av ráevnunum, til stuðulin er komin niður á 0", sigur Helle Thorning-Schmidt. Espersen misnøgdur Danski Fólkaflokkurin hevur fleiri ferðir kravt, at avtalan við grønlendingar verður endurskoðað við tí fyri eyga at tryggja danska ríksikassanum ein størri part av inntøkunum, og flokkurin er misnøgdur við orðini hjá forsætisráðharranum. "Vit fara kanska at spara 3,5 milliardir krónur einaferð í tíðini, men tað er lítið av tí, sum kann koma undan kavi. Tað eru jú metingar um, at virði fyri 10.000 milliardir krónur eru í grønlendsku undirgrundini. Tað svarar til okkara verjuútreiðslur í 500 ár, og samanborið við tað er 3,5 milliardir eitt lítið tal," sigur Søren Espersen við Ritzau. Hann er framsøgumaður hjá Danska Fólkaflokkinum í grønlendskum viðurskiftum